## Gamla Reinsarí spælistað

Tórshavnar býráð er farið í holt við at fyrireika Gamla reinsaríðið til spælistað hjá tónleikarum. Í løtuni verður húsið høvuðsumvælt uttan, og samstundis verður arbeitt við eini heildarætlan fyri reinsaríðið og økið rundanum við smáu bygningunum og túnunum í millum. Hetta hevur mentamálanevndin samtykt. Ætlanin er, at fáa eitt heildarkonsept við spælistaði og venjingarhølum, og øðrum kreativum virksemi til t.d. myndlist. Og túnini rundanum skulu gerast hugnalig so at tað eisini ber til at vera uttandura tá ið veðrið loyvir tí.

## Jóansøkubál í Sandágerði

Óalment jóansøkubál var í Sandágerði leygarkvøldið. Nakrir ungir mans høvdu tikið seg saman at brenna eitt bál í góðveðrinum, men hetta hevði einki at gera við almenna miðsummarbálið, sum kommunan skipaði fyri hóskvøldið í farnu viku. Hetta var bert gjørt til stuttleika og hugna. Á myndini eru ungu menninir við at leggja síðstu hond á »bálið«

# Stór politisk ónøgd við bankasøluna

**Tinglimir úr bæði samgongu og andstøðu eru ónøgdir við einskiljingarleistin, sum verður brúktur í sambandi við søluna av Føroya. Hetta hendir, hóast 31 av 32 tinglimum atkvøddu fyri hesum leisti. John Johannessen mælir til, at allar aðrar einskiljingar verða steðgaðar, áðrenn bankasølan er kannað. Hann spyr, um tað er av tilvild, at Jákup á Dul Jacobsen headhuntaði Bárð Nielsen. Poul Michelsen sigur, at fólk hava rætt at føla seg snýtt**

EINSKILJING
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*



*Tingfólk eru sera hvassorðað móti bankasøluni, sum tey sjálv vóru við til at samtykkja*

Tað eru ikki allir samgongulimir, sum eru so fegnir um gongdina í bankamálinum í seinastuni. Hvørki á høgraella vinstraveinginum í samgonguni.

Javnaðarmaðurin, John Johannessen, skrivar í lesarabrævi, at »sølan stinkar«, og fólkafloksmaðurin, Poul Michelsen, skrivar, at »bankin er seldur fyri væl minni enn hann er verdur«.

Heldur ikki framsøgumaðurin hjá Tjóðveldisflokkinum, Tórbjørn Jacobsen, hevur givið bankasøluni tey bestu skotsmálini.

Allir hesir tríggir tingmenninir vóru kortini við til at atkvøða fyri, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum heimilaði Fíggingargrunninum frá 1992 at skráseta partabrøvini í P/F Føroya Banka á Virðisbrævamarknaði Føroya og selja partabrøvini, soleiðis at ein partur skuli verða seldur bólki aella bólkum av fíggjarligum íleggjarum, meðan restin skuldi verða seld privatum og sokallðaðum stovnsligum íleggjarum.

### Jákup á Dul keypti fíggjarmáláráharran

John Johannessen vil vera við, at »tann ríki gjørdist ríkari, og harvið gjørdist munurin ímillum lønartrælin og alsamt sjónligaru nýggju aðalstættina enn størri" eftir søluna. Javnaðartingmaðurin spyr eisini, hvussu tað bar til, »at stjórarnir beinanvegin sluppu at seta heilt upp í 7 milliónir krónur í bankan. Var tað tí, at teir vistu, at partabrøvini vóru yvirteknaði 26 ferðir og tí kundi annar stjórin seta seg fyri 181 milliónum, fyri til endans at fáa 7«.

Tað er heldur ikki sørt, at John Johannessen rør framundir, at samband er millum, at Jákup á Dul Jacobsen setti fyrrverandi landsstýrismannin í Fíggjarmálum, Bárð Nielsen, sum stjóra fyri byggiætlanini Stórutjørn, nú sami Jákup á Dul Jacobsen eigur smápartafeløg, sum hava keypt stóran part av bankanum.

»Hvussu ber tað til, at ríkmaðurin sum her fyri ósmæðið keypti landsstýrismannin í fíggjarmálum, uttan truplleikar gjørdist størsti eigarin av einskilda bankanum? Hvønn leiklut hevur landsstýrismaðurin, sum upprunaliga fyrireikaði søluna, seinni havt í keypinum av bankanum? «, spyr javnaðartingmaðurin.

Somuleiðis ávarar John Johannessen ímóti at fremja aðrar einskiljingar, áðrenn sølan av Føroya banka er kannað: »Oman á allar hesar spurningar ber kortini tíverri til at staðfesta, at hendan fyrsta veruliga privatiseringin hevur førkað føroyska samfelagið nærri einum ógvuliga óhepnum stættarbýti. Hetta eigur Javnaðarflokkurin ikki at lata sær lynda. Og tí er tað, at eg eftir at hava ráðført meg við nøkur av fremstu fólkunum í Javnaðarflokkinum mæli til, at allar privatiseringar verða steðgaðar meðan Føroya Banka sølan verður eftirmett og politiskt viðgjørd«.

### Fólk føla seg snýtt

Heldur ikki Poul Michelsen hevur mjúk orð at geva søluni, sum hann sjálvur var við til at atkvøða fyri. »Eg eri sterkt í iva um sølan av Føroya Banka fær positivar avleiðingar á aðrar einskiljingar«(...)»At eftirspurningurin at keypa partabrøv varð 26 ferðir størri enn útboðið, sigur nakað um hvussu skeiv virðismetingin av Føroya Banka er. Tað er bara eitt faktum«.

(...) »Fólk hava fullan rættin at føla seg snýtt. Fyrst hava tey ikki fingið møguleikan at keypa partabrøv í rímiligan mun, og harnæst hevur samfelagið mist hundraðtals milliónir«.

### Bankin foreraður burtur

Sosialurin hevur seinastu dagarnar royndt at fingið eina viðmerking frá størsta andstøðuflokkinum um ta politisku ónøgdina, sum valdar í samgonguni um hetta málið. Enn hevur tó ikki eydnaðst at fáa orðið á framsøgumann Tjóðveldisfloksins, Tórbjørn Jacobsen, men fyrr í mánaðinum skrivaði hann m.a. í eini grein, at »Javnaðarstjórnin hjá Jóannesi Eidesgaard fæst í hesum døgum við at forera ein banka burtur til útlendingar og nakrar føroyingar, sum hava orku og fíggjarmegi at gerast partur av klondyke søguni Føroya Banki« (...) »Politiski pyromanurin Bárður Nielsen kyndi og oysti benzin á bálið, og tók til beins áðrenn hann skoldaði sær holdið«.

Sostatt er líkt til, at tingfólk eru sera ónøgd við einskiljingarleistin, ið 31 tingfólk sjálv vóru við til at samtykkja 2. mai í fjør.

## Løgtingið hevur ábyrgdina

**Hermann Oskarsson, búskaparfrøðingur, heldur at løgtingsfólk spæla skitið spæl, nú tey siga seg vera ónøgd við bankasøluna**

EINSKILJING
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Løgtingslmir hava sjálvir ábyrgdina, at einskiljingargongdin fer fram sum hon ger. Hetta sigur Hermann Oskarsson í lesarabrævi, sum tað tíverri ikki eydnaðist at fáa við í dagsins blað. Hann heldur, at sølan er farin fram solieðis sum tinglimir samtyktu hana, og tí sømir tað seg ikki, at tingfólk nú finnast at hesi gongd.

»Løgtingsmenninir, sum nú ósmædnir og østir loypa upp úr sessinum, spæla eitt skitið spæl fyri gallarínum, nú teir stinga fyrrverandi landsstýrismannin og formannin í Fíggingargrunninum í bakið. Sølan fór fram akkurát sum teir sjálvir hava samtykt, hóast teir kanska ikki hava skilt tað í rætta tímanum. Ábyrgdin liggur á einum stað, og bara á einum stað – í Løgtinginum.

Hetta var eitt tiltak, sum legði doyðin á at halda útlendskan kunnleika, útlendska samábyrgd og útlendska kapping burtur frá føroyska fíggjarmarknaðinum – alt meðan vit globalisera Føroyar og skunda okkum fram móti 2015«, skrivar Hermann Oskarsson m.a.